# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



Vit eru Harranum takksom fyri at hann gav okkum eina lítla fitta gentu tann 28.des.2005. Hon vigaði 3600 g. og var 51 cm. long. Hon fekk navn stutt áðrenn middnátt gamlaárskvøld. Hon eitur Silvia Karlsdóttir Vang



16. januar fingu Rannvá og Dávid Davidsen, Tórshavn, tvíburar, gentu og drong. Gentan var 48 cm. long og vigaði 2210 gr. og drongurin var 52 cm. langur og vigaði 3020 gr. Tey eita Sanna og Jàkup

6. januar fingu Kate S. Kruse og Áki Simonsen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3415 gr.

17. januar fingu Sonja Árnadóttir Heinesen og Hallur Joensen, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3560 gr.

20. januar fingu Hanna Fonsdal og Pauli Zachariasen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4200 gr.

20. januar fingu June Jacobsen og Kaj Johannesen, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4400 gr.

21. januar fingu Miriann Hentze og Oddur Hentze, Sandur, eina dóttur. hon var 54 cm. long og vigaði 4160 gr.

21. januar fingu Maj-britt Hellisdal og Johnny Samuelsen, Argir, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3340 gr.

22. januar fingu Heidi Davidsen og Regin Johannessen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3370 gr.

22. januar fingu Martha og Andrias Hammer, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3600 gr.

22. janaur fingu Jana Mikkelsen og Eyðun Jakobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3565 gr.

23. januar fingu Ranvá og Ove Nysted tvíburar, drong og gentu. Drongurin var 49 cm. langur og vigaði 2580 gr. og gentan var 49 cm. long og vigaði 2590 gr.

23. januar fingu Randi Saxov og Eyðfinn Eyðunsson, Argir, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3700 gr.

26. januar fingu Hilda og Hanus Kjølbro, Viðareiði, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3700 gr.

## Fríðhild vann ferðina

**Fríðhild Jacobsen í Hvalba vann ferð frá Atlantic Airways/Lalandia í jólakalendarakappingini hjá Sosialinum í desember, og týsdagin fekk hon vinningin handaðan**

GÁVUHANDAN

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Ein av vinningunum í jólakalendarakappingini hjá Sosialinum í desember var eitt gávukort upp á samflex flogferð fyri tvey vaksin og tvey børn frá Atlantic Airways og Lalandia.

Hepni vinnarin av gávukortinum við ferðini gjørdist Fríðhild Jacobsen í Hvalba.

Týsdagin fekk hon vinningin handaðan, tá umboð fyri Sosialin stakk inn á gólvið hjá henni og manninum í Hvalba, og hóast myndatøka ikki stendur fremst á listanum yvir yndisítriv, so var tað ein fegin Fríðhild, ið tók ímóti góða vinninginum.



*Dagfinn Olsen frá Sosialinum handar Fríðhild Jacobsen ferðaseðilin, hon vann í jólakalendarakappingini hjá Sosialinum*

Incra Sp/f:

## Shiny Wheels komið á marknaðin

**Hósdagin var móttøka hjá AutoService við Oyggjarvegin í Havn í samband við at eitt nýtt produkt til at reinsa felgur á bilum við, Shiny Wheels, er komið á marknaðin**

MÓTTØKA

*Myndir: Magnus Gunnarsson*

Shiny Wheels er ein nýggj vøra, ið er framleidd til at reinsa felgurnar á bilinum við.

Tað er fyritøkan Incra Sp/f v. Regin W. Dalsgaard, sum stendur fyri hesi verkætlan, ið er gjørd saman við Kemilux.

Møguleiki var eisini fyri at royna nýggju vøruna. Fólk vóru vælkomin at hava bilin við og royna hvussu Shiny Wheels virkaði. Fleiri nýttu høvi og fingu felgurnar reinsaðar við sera góðum úrsliti.

Shiny Wheels er ein føroysk vøra, ið er framleidd í Føroyum og er ætlað bæði føroyska og marknaðinum í grannalondunum.



*Hósdagin var móttøka hjá AutoService í samband við at Shiny Wheels, er komið á marknaðin. Her er Regin W. Dalsgaard (uttast til høgru) saman við starvsfólkum hjá Kemilux*



**Prógv**
20. januar 2006 fekk Amanda Ellingsgaard av Eiði prógv sum Professionsbachelor í Ernæring og Sund-hed við sernám í sundhedskommunikation á Suhr's Seminarium Keypmannahavn.

Eva Hansen, Klaksvík, hevur 19. januar 2006 lokið prógv sum professionsbachelor i pædagogik á Aalborg Socialpædagogiske Seminarium.

**Dagurin**
**28. Januar. Karlamagnus keisar**i, deyður í 814. Eini 400 ár eftir deyða sín varð hann eftir uppskoti frá týska keisaranum Fríðriki Barbarossa skírdur halgimenni, men heitið varð ikki viðurkent av pávanum í Róm. Karlamagnus hevur annars verið høgt í metum, ikki minst í Føroyum. Karl er germanskt navn og merkir maður, og Magnus er latínskt og merkir stórur.

**29. januar. Valerius**. Var síðst í triðju øld biskupur í Trier í Týskland

**30. januar. Aðalgunn**, deyð umleið ár 684. Fyri at sleppa undan giftu, sum foreldrini vildu hava hana at ganga inn í, flýddi tann unga Aðalgunn og fór í Kleystur. Hon grundlegði seinni kleystrið Maubeuge í Norðurfraklandi og var har tann fyrsta abbadissan.

**Silvurbrúdleyp**
24. januar høvdu Bergur og Mary-Jana á Reynatrøð, Runavík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 28. januar kl. 18.00.

**60 ár**
Mánadagin tann 30. januar fyllir Laura Joensen, Tórshavn, 60 ár. Opið hús verður á Gamla Meiarínum sunnudagin tann 29. januar kl. 14.00.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum mongu, sum gleddu meg á 75 ára føðingardegnum 8. januar 2006. Takk til øll tykkum, sum komu í føðingardag.

Takk fyri gávur, blómur, heilsanir, talur og sang. Takk øll tit, sum ringdu og sendu fjarrit. Takk til børn, svigarbørn, ommubørn og langommubørn fyri ein ógloymandi dag. Eisini stóra takk til tykkum øll, sum hjálptu til á ymiskan hátt. Tykkum øllum ynskist eitt av Harranum vælsignað nýggjár.

**Asta Poulsen**